# Radiostøð 90 ár

Í gjár vóru 90 ár liðin, síðani Reykjavík radio varð tikin í nýtslu tann 17. Juni í 1918. Í dag er støðin partur av íslendsku sjóverjuni. Upprunaliga var alt samskifti við morsing, og í 1920 fekk trolarin Egill Skallagrímsson sum tað fyrsta íslendska skipið telegraf. Ttað var ikki fyrr enn í 1930, at støðin eisini bleiv telefonstøð. Í fyrstani hevði støðin tvær 77 metrar høgar antennur í Reykjavík, men seinni vórðu antennur settar upp aðrastaðni kring landið. Samanumtikið fekk radiostøðin stóran týdning fyri skip, sum royndu undir Íslandi.



# Eimskip mist meira enn hálva milliard



*Avtøkan av dóttirfelagnum hjá Eimskip í Bretlandi, Innovate, hevur onga ávirkan í Faroe Ship, sigur Jóhanna á Bergi, stjóri*

**Móðurfelagið hjá Faroe Ship, Eimskip, hevur gjørt av at strika dóttirfelagið Innovate í øðrum ársfjórðingi, og hetta merkir, at góðar 540 milliónir krónur verða avskrivaðar, skriva íslendsk bløð**

AVSKRIVING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eimskip í Íslandi verður í løtuni kannað av íslendska kappingarráðnum, tí ivi er sáddur um, hvørt felagið hevur hildið upplýsingarskyduna í sambandi við strikingina av dóttirfelagnum Innovate.

Ført hevur verið fram, at Eimskip longu í februar mánaði í ár tók avgerðina um at niðurleggja dóttirfelagið í Bretlandi, meðan avgerðin ikki varð almannakunngjørd fyrr enn í síðstu viku.

Íslendsk bløð ivast í, um avgerðin ikki varð tikin í februar, tí tað sampakkar væl við, at táverandi stjórin, Baldur Guðnason, legði frá sær sum stjóri í Eimskip.

Kappingarráðið hevur ikki tikið nakra støðu enn, men verður komið fram til, at Eimskip ikki hevur hildið sínar upplýsingarskyldur mótvegis partaeigarunum, kann felagið fáa eina bót upp á 50 milliónir íslendskar krónur.

Eimskip hevur gjørt eina langa røð av íløgum seinastu árini, og felagið er tíggjufaldað seinastu trý árini. Íløgan í bretska Innovate, sum var ein fyritøka við goymslubygningum og lastbilum, var so ein íløga, ið ikki hepnaðist soleiðis, sum Eimskip hevði vónað. Og tí hevur felagið gjørt av at avtaka Innovate.

### Ávirkar ikki í Føroyum

Millum mongu dóttirfeløgini hjá Eimskip er eisini Faroe Ship. Men Jóhanna á Bergi, stjóri, sigur, at hendan avgerðin hjá Eimskip ikki hevur nakra beinleiðis ávirkan á gerandisdagin hjá Faroe Ship.

- Tað er sjálvandi altíð keðilig tíðindi, tá neyðugt er at avtaka eitt felag. Men Eimskip er so mikið stórt, at tað ikki í størri mun ávirkar felagið, og okkara gerandisdagur er hin sami, sigur Jóhanna á Bergi.

Hon vísir á, at tað eru so mong íslendsk feløg, sum í dag hava truplari við at útvega sær reiðan pening orsakað av kreppuni á fíggjarmarknaðunum sum heild.

- Partabrøvini eru fallandi, men tað er galdandi í síni heild á børsunum. Fyritøkur hava truplari við at gjalda rokningar, og tað ávirkar allan vegin ígjøgnum, sigur Jóhanna á Bergi.

Hon sigur, at tey hava gjørt rationaliseringar og effektiviseringar í rakstrinum í Føroyum, men at tað einki hevur við avtøkuna av Innovate at gera.

- Har var talan bara um eina íløgu, ið ikki lønti seg sum Eimskip hevði vónað, sigur Jóhanna á Bergi.

# Ósemja um ognarskatt

**Meðan Jørgen Niclasen skýrir nýggju tinglýsingargjøldini sum ognarskatt, vísir Karsten Hansen aftur, at hetta hevur nakað sum helst við ognarskatt at gera**

OGNARSKATTUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jørgen Niclasen finst harðliga at nógv økta prísinum á tinglysingum, sum hann skýrir fyri ognarskatt*

- Nýggja lógin um tinglýsingavgjald er steinur oman á byrðu hjá nógvum húsarhaldum í Føroyum. Serliga aftaná, at vit hava havt ein ógvusligan vøkstur í húsakeypum. Við hækkandi rentum og methøgum oljuprísum er fíggjarliga rásarúmið hjá familjum mundandi minka. Stór eykarokning í tinglýsing fylgur nú við.

Tað sigur Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins. Hann vísir á, at fyri tey, ið skulu ogna sær bústað, er eykarokningin lættliga 40.000 krónur bara í tinglýsing av skjeyti og tinglýsing av panti. Og hann skýrir hetta fyri ognarskatt.

Men hesum vísir Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri aftur.

- Ognarskattur er ein skattur, tú rindar av ognum tínum árliga. Tinglýsingargjaldið er eitt einaferð gjald, og hevur tískil einki við ognarskatt at gera, sigur Karsten Hansen.

- Nú slíkar upphæddir eru lagdar oman á húsaprísin er lætt at rokna, at við rentum í 20 ár svarar tað til eina heila ársinntøku, bara fyri tinglýsingargjaldið. Har reyk eginpeningurin hjá fleiri av nýggju húskeyparunum, sigur Jørgen Niclasen.

Men hetta er einki øðrvísi enn í øllum framkomnum londum.

Okkara tinglýsingargjald er framvegis munandi lægri enn í grannalondunum, og hetta er so bara ein háttur at fáa nøkur oyri í landskassan. Onkur má rinda inn í landskassan, serliga tá so stórur kravgangur er eftir at fáa pengar úr honum, sigur Karsten Hansen.



*– Hetta hevur einki við ognarskatt at gera, sigur fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen*